# Suð til Skotlands á konsertferð



*16 satsir úr Messias verða á skránni, tá kvinnukórið Suð fer til Skotlands á konsertferð á páskum. Seinni framføra tær satsirnar í Føroym*

**Langa fríggjadag fer kvinnukórið Suð úr Klaksvík á konsertferð til Aberdeen, har tær fara at syngja satsir úr Messias. Eftir konsertferðina fer kórið at framføra satsirnar í Føroyum**

KONSERTFERÐ

Konsertin í Aberdeen verður hildin í St. Machar Cathedral í Aberdeen 1. páskadag kl. 19:45.

Á skránni eru 16 satsir úr Messias hjá Handel. Hetta eru bæði kórsatsir, ið eru útsettir til tríggjar kvinnurøddir umframt nakrar ariur og nøkur resitativ. Afturat Messias fer Suð at syngja ymiskt føroyskt og brot úr øðrum kendum verkum. Jóhannes Andreasen verður við sum klaverleikari.

Síðst í apríl og um hálvan mai fer Suð at framføra satsirnir úr Messias í Føroyum.

**ave**

# Forum-teatur og aðalfundur

**Vikuskiftið 21.-23. apríl skipa Ung í MáF fyri skeiði í Eysturskúlanum, har undirvíst verður í Forum teatri. Eisini er aðalfundur á skránni**

SKEIÐ/AÐALFUNDUR

Forum teatur er ein leikháttur, sum brúktur verður at spæla fyri til dømis starvsfólki á stovnum o.ø. Tann, ið hevur skrivað leikin, hevur lagt ein trupulleika inn, ofta nokkso provokerandi, sum fær fólk at reagera. Áskoðarin loypur upp á pallin fyri at spæla leiklutirnar øðrvísi - soleiðis sum hann metir, at teir skulu verða spældir.

**Rættindi hjá børnum á pall**

Ætlanin við skeiðnum er at brúka royndirnar í sambandi við tiltak hjá Barnabata, sum verður í heyst, nevnt "Tú hevur rætt", og sum snýr seg um rættindini hjá børnum.

Endamálið við verkætlanini hjá Barnabata er at gera vart við umstøður og rættindi hjá børnum í Føroyum. Hetta skal m.a. gerast við at seta gongd á eitt umfatandi arbeiði, sum í høvuðsheitinum snýr seg um at upplýsa børn í Føroyum um, hvørji rættindi tey hava.

Undirvísari á Ung í MáF-skeiðnum verður Susanne Ruthström úr Svøríki, sum dagliga undirvísir ungum í Forumteatri.

**Skeið og aðalfundur**

Skeiðið er fyri øll áhugað, roynd sum óroynd, sum eru millum 15 og 25 ár. Undirvíst verður frá fríggjakvøldi 21. apríl kl. 19 til sunnukvøld 23. apríl kl. 17. Gist verður á Eysturskúlanum. Á skeiðnum verður somuleiðis aðalfundur hildin. Hann verður leygarkvøldið 22. apríl kl. 19. Tekning hjá MáF í seinasta lagi mikudagin 19. apríl á middegi.

Tey, sum vilja vita meira, kunnu venda sær til Birnu Heinesen á tlf. 222443 ella MáF, tlf. 315624, maf@maf.fo.

**ave**



*Magna Auðunsson, "Múli"*

# Magna Auðunsson í Norðoya Kunningarstovu

**Landslagið í Norðoyggjum og barnaárini í Klaksvík er nakað av tí, sum hevur givið íblástur til málningarnar hjá Magnu Auðunsson, sum hendan mánaðin hevur framsýning í Norðoya Kunningarstovu**

LISTAFRAMSÝNING

Magna Auðunsson hevur búð nógv ár í Íslandi, har hon eisini av álvara byrjaði at royna seg sum listakvinna. Um tíðina í Íslandi sigur Magna, at umhvørvið var sera kveikjandi, bæði tá tað ráddi um tekni- og málihættir, men eisini í tí praktiska arbeiðinum við at ramma inn og og seta framsýningar upp.

Magna hevur nomið sær kunnleika um list frá lærarum á Listaskola Islands, Hægri lærustovni í Aberdeen, á Thorstedlund Kunsthøjskole í Danmark og eisini á Føroya Læraraskúla, har hon tók læraraútbúgving við list sum sergrein. Hon hevur búð í Føroyum síðani fyrst í nítiárunum og hevur havt hópin av framsýningum bæði her heima, í Íslandi, Noreg, Svøríki og Danmark.

Um íblásturin til sínar málningar sigur Magna soleiðis

– Mínar naturalistisku landslagsmyndir verða til í eini samanrenning av náttúruupplivingum og tí innara universinum, tí innara landslagnum. Eg gjørdist tíðliga sera hugtikin av náttúruni rundan um meg. Tað kennist sum at upplivingar, myndir og hugløg frá barnaárunum hava sett seg føst á nethinnuna, og tað kann onkuntíð verða til mystiskar og abstraktar málningar, sigur Magna.

26 størri og smærri akrylmálningar eru við á framsýningini í Norðoya Kunningarstovu, sum er opin allan apríl mánað.

**ave**

# Vinkonur í Leikalund

**Fríggjadagin lat upp listaframsýning í Leikalund við málningum hjá vinkonunum Berit Norðoy og Bjørg M. Andersen**

LISTAFRAMSÝNING

Til dagligt arbeiða tær báðar vinkonurnar Berit Norðoy og Bjørg Mohr Andersen sum ávikavist bankakvinna og fotografur. Men stóra felags áhugamálið er myndlistin, og hava tær báðar verið við á fleiri framsýningum í Føroyum.

Berit málar abstraktar myndir, har tú hómar fólk og fjøll. Á myndunum, hon nú sýnir fram, hevur hon lagt seg serliga eftir at arbeiða við litum.

Málningarnir hjá Bjørg eru eisini abstraktir, har eitt gjøgnumgangandi tema er dýpdin, sum kemur fram á ymsar hættir í eyðkenda reyða litinum.

Framsýningin verður at síggja í vanligu upplatingartíðunum hjá Leikalund.

**ave**



*Mynd eftir Berit Norðoy*



*Mynd eftir Bjørg Mohr Andersen*